# Frágreiðing um ung løgd fram um telesamskifti



*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Í Føroyum luttóku umboð fyri serkunnleikan, Útnorðurráðið og fjølmiðlar*



*Lisbeth L. Petersen, varaformaður Útnorðurráðsins, beyð luttakarunum vælkomnum*



*Serkunnleikin hevði skikkaðar spurningar at seta teimum, ið gjørt hava kanningina um ung í Útnorði*

*Hósdagin var kanningin, sum Útnorðurráðið hevur latið gera um lívsvirðini hjá ungum, løgd fram. Hetta hendi um telesamskifti, tí í Íslandi sótu tey, ið hava gjørt kanningina og í Føroyum umboð fyri Útnorðurráðið og fjølmiðlar*

DAGFINN OLSEN

Útnorðurráðið hevur latið gera kanning, ið nevnist De unges livssyn í Vestnorden. Tað er íslendska Socialvidenskabeligt Institut, ið hevur staðið fyri arbeiðinum, ið fevnir um ung í Føroyum, Íslandi og Grønlandi.

Kanningin er í snøggum, greiðum og áhugaverdum bóklingi. Hósdagin varð kanningin løgd fram á Tænastumiðstøðini hjá Føroya Tele. Hetta hendi um telesamskifti.

### Tvey støð um somu tíð

Í Íslandi sótu umboð fyri tey, ið gjørt hava kanningina og í Føroyum umboð fyri Útnorðurráðið og fjølmiðlar og serfrøðingar.

Á sjónvarpsrúti sóu íslendsku umboðini føroyingarnar og í Føroyum sóu tey íslendingarnar. Tøknin gjørdi tað sostatt gjørligt at hava ein og sama fund á tveimum støðum um somu tíð.

### Áhugaverd tøl

Í Íslandi sótu Fríðrik Jónsson, Hrefna Guðmundsdóttir og Páll Brýnjolfsson, ið byrjaði fundin.

Lisbeth L. Petersen, varaformaður Útnorðurráðsins, beyð vælkomin og greiddi frá útnorðursamstarvinum.

Hon fegnaðist um at kunna leggja okkurt ítøkiligt á borðið, eftir at arbeiðið í ráðnum varð lagt um í 1995.

Fríðrik Jónsson greiddi síðani nærri frá frágreiðingini. Og eisini prógvaði tøknin sínar dygdir. Hann nýtti sokallað Power Point. Tey flestu kenna til hetta, at okkurt verður skrivað á eina talvu ella varpað upp á veggin við uppvørpu (overhead).

Nú kemur slíkt beinleiðis á teldu- ella sjónvarpsrútin, um neyðugt.

Kanningin er áhugaverd, tí hon lýsir tey ungu í Íslandi, Føroyum og Grønlandi sera neyvt, tá um lívsvirðini ræður. Sostatt ber eisini til at sammeta londini. Tey ungu hava svarað spurnarbløðum um ymisk viðurskifti.

Komið verður m.a. inn á metingar teirra um umhvørvisspurningar, hvørji tey ikki vildu ella vildu havt til grannar, t.d. fólk úr øðrum londum ella misnýtarar. Metingar viðvíkjandi morali, hjúnalag og trúskapi, religión, tjóðskapi og framtíðarvónum.

Tikið varð m.a. fram, at í Grønlandi løgdu tey ungu minni í umhvørvisspurningar, enn í hinum báðum londunum.

Tá um virkið trúarlív ræður, liggja føroysku ungdómarnir fremstir. Í Íslandi eru tey hinvegin bangnast fyri huldufólki og líknandi.

Serfrøðingar vóru bodnir við á fundin og t.d. setti Eyðun Andreassen spurnartekin við, hvørt tað kundi bera til, at tá starv faðirsins bleiv nevnt, so fann hann ongastaðni fiskimenn, men bert serkønar, hondverkarar ella sjómenn. Mong av ivamálunum, ið komu á borðið, tóktust hava støði í óneyvum greiningum av fyribrigdum.

Ein av niðurstøðunum hjá teimum, ið gjørt hava kanningina var, at londini líkjast meira, enn tey væntaðu, tó at munir eru. Mett var, at kanningin gevur frálíka mynd av lívinum hjá ungum í londunum. Vón var um, at tað fer at bera til at sammeta við slíkar kanningar í Europa.

Samanumtikið áhugaverd tøl og útgreinað viðurskifti, ið ikki ofta eru fest á blað ella førd sum hagtøl.

# United Voices sangmarathon

*United Voices ætlar sær uttanlanda á sangferð. Í hesum sambandi skipa tey í kvøld klokkan 19 fyri sangmarathon, ið heldur fram í eitt samdøgur uttan steðg*

DAGFINN OLSEN

Í kvøld, fríggjakvøld, klokkan 19, skipar United Voices fyri tiltakið, ið heldur fram til leygarkvøldið klokkan 19.

Tiltakið verður í Evangeliihúsinum í Havn.

Talan er um opið hús. Fólk kunnu so tekna stuðulsbrøv fyri ávíst tímatal. Brævið er samstundis atgongumerki til alt samdøgrið, ið tiltakið fer fram. Samstundis eru tey, ið stuðla, við í lutakastinum um ein ferðaseðil til Danmarkar fyri tvey. Hetta er stuðlað av Maersk.

### Sangferð

United Voices roynir við tiltakinum at savna nakað av peningi, nú kórið ætlar sær á sangferð. Tey fara av landinum tann 26. juni. Tann 27. juni syngja tey í Århus og tann 29. juni í Tivoli. Tann 20. juni á Ráðhúsplássinum í danska høvuðsstaðnum.

Tann 2. juli fara tey til Álands at syngja í Mariehamn. Heimferðin er tann 4. juli.

Umframt United Voices, fara onnur at hjálpa til til marathontiltakið í kvøld.

Klokkan 19 til 20 fara United Voices á pall. Tey eru aftur leygarmorgunin frá 4 til 5 og frá 10:30 til 11:30. Tey enda eisini tiltakið leygarkvøldið frá klokkan 18 til 19.

Onnur fara so at fylla skránna út. Bólkurin I am fer á pall og eisini fara á pall lovsongbólkar og solistar.

Tiltakið í Evangeliihúsinum er opið hús, har øll eru vælkomin. Talan er um tvørkirkjuligt tilak.

*United Voices skipar í kvøld fyri sangmarathon í eitt samdøgur, til frama fyri sangferð*





# Stórur áhugi fyri oljutingi



*Sjáldan hevur verið so fullsett á Parnassinum sum mikukvøldið, tá Oljutingið varð stovnað. Fólk vóru úr øllum landinum umboðandi alskyns stovnar, feløg umframt at har eisini vóru einstaklingar við áhuga fyri oljuvinnuni. Mynd Jan Müller*

Jan Müller

Skulu vit ganga eftir uppmøtingini til stovnan av áhugafelagsskapinum „Oljutingið“ í Havn mikukvøldið, so seta føroyingar stórar vónir til eina koma oljuleiting á landgrunninum. Ikki færri enn 130 fólk úr øllum landinum høvdu leitað sær til Havnar í góðveðrinum at vera við til at stovna enn eitt áhugafelag. Og tað varð stovnað uttan stórvegis hóvasták. Ein av stigtakarunum Dávur Reinert Hansen beyð vælkomin og segði, at nú oljuvinnan umboðaði so mong ymisk fak, so var eisini tørvur á einum felag, einum forum fyri tey ymsu fakini, har man kundi kunna seg sjálvan og hvønn annan.

Felagið hevur fingið heitið „Oljutingið“ ella á enskum „Petroleum Association of the Faroe Islands“. Í fyrstu nevndina vórðu vald: Martin Heinesen, Alex Buvik, Geir Atle Rishovd, Ingvør Nolsøe og Jan Mortensen.

Endamál felagssins er sum ein tvørfakligur felagsskapur fyri fólk, ið starvast í oljuvinnuni, ella sum hava áhuga fyri oljuvinnu, at geva limum sínum høvi til at kunna seg um oljuvinnu og tað virksemi, sum er knýtt at henni stendur í endamálsgrein felagsins, sum eisini sigur, at felagið er eitt áhugafelag limanna og hevur á ongan hátt vinnuligt endamál. Øll kunnu gerast limir í felagnum, einstaklingar, feløg ella felagsskapir. Einstaklingar rinda í árligum limagjaldi 200 kr, meðan feløg gjalda 1500 kr. Umsitingaruppgávur verður í hvussu er fyribils at vera avgreiddar frá skrivstovuni hjá Vinnuhúsinum.

Ætlanin hjá felagnum at skipa fyri fyrilestrum og leggja upp til tjak varð sett í verk longu á fyrsta fundinum. Har vóru tveir fyrilestrar, men tíðin rakk ikki til tjak eisini. Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum helt fyrilestur undir heitinum „Ein útbjóðing - fleiri avbjóðingar“, og Gunnvør Balle, sum stendur á odda fyri komandi oljuvirksemi hjá Tórshavnar Skipasmiðju, tosaði um samstarvsavtalur í oljuvinnuni.

Herálvur Joensen fegnaðist um, at felagið er stovnað og vónaði hann, at hetta kann verða mennandi fyri oljutjakið. Hann valdi annars at tosa um gongdina í oljumálinum fram til dag og nevndi tær mest týðandi fortreytirnar fyri tí støðu, sum vit eru í í dag. Talan er um tær tríggjar meginfortreytirnar, nevniliga at fáa undirgrundina á føroyskar hendur, at fáa gjørt neyðugu jarðfrøðiligu forkanningarnar og at fáa ásett undirgrundarmark millum Føroyar og Bretland.

Stjórin í Oljumálastýrinum manaði í jørðina tær mongu gitingar og illgitingar, sum hava gingið um, hví danski forsætisráðharrin Poul Schlúter á sinni bráddliga gjørdi av at lata føroyingum rættin til undirgrundina. Hann helt fyri, at vit í hesum gitingum høvdu gjørt bæði dønum og okkum sjálvum órætt, tí kanska var svarið so einfalt sum tað, at danska stjórnin varð komin til, at tíðin varð búgvin til eina slíka loysn, og at okkara egnu fólk høvdu gjørt eitt sera gott arbeiði.

-Oftani er her í Føroyum torført at geva keisaranum tað, ið keisarans er, og tað er góða samráðingarúrslitið í undirgrundarmálinum eitt dømi um. Herólvur Joensen helt fyri, at vit vóru sera væl fyrireikað, og at okkara embætisfólk og ikki minst Atli Dam, táverandi løgmaður gjørdu eitt sera gott arbeiði í hesum samráðingum.

Eisini í marknamálinum helt Herálvur Joensen, at vit hava gjørt eitt gott og miðvíst arbeiði, ikki minst tí vit hava hildið okkum til lógarinnar bókstav, tá tað snúði seg um at tulka altjóða rætt.

### Reinføra føroyska oljuumsiting

Herálvur Joensen nevndi eisini komandi oljuleiting. Hann vísti á, at tað er ikki nøkur løtt uppgáva hjá okkum sum eitt lítið land at byggja upp eina oljuumsiting, sum skal standa upp ímóti teimum stóru oljufeløgunum, sum hava drúgvar royndir og orku. Hann helt styrkina vera, at vit ikki lata okkum tøla av góðum tilboðum, sum oljufeløgini koma við og vónaði, at vit fáa eina reinføra føroyska oljuumsiting.

Gunnvør Balle tosaði um samstarv og avtalur millum føroyingar og útlendingar og føroyingar sínamillum. Hon legði stóran dent á, at føroyskar fyritøkur kunnu samstarva við útlendskar fyritøkur, men tað er eisini sera týdningarmikið, at føroyskar fyritøkur kunnu kasta saman í komandi oljuútviklinginum. Hon metti, at tað er umráðandi, at vit kenna okkum viðfarin á jøvnum føti við aðrar. Størri møguleikar eru fyri menning gjøgnum samstarv heldur enn í sjálvdrátti. -Hví vilja útlendingar so arbeiða saman við okkum spurdi Gunnvør Balle og svaraði, at hetta lutvíst er út frá einum skilagóðum kravi frá føroyskum myndugleikum. Tað er so eisini tíðin, sum talar fyri slíkum samstarvi, at man nettupp tekur lokala partin við í arbeiðið. Tað eru so eisini fyrimunir hjá útlendskum fyritøkum at arbeiða saman við føroyskum fyritøkum, tí hesar hava eina vitan um samfelag, mentan, politikk, fólk ol. sum hinar ikki hava. Hon helt annars, at vit fáa mest burtur úr samstarvsavtalum við at hava heilt greið mál og við at seta avtalurnar væl saman.



*Hesir báðir norsku „oljugubbarnir“ vórðu valdir í fyrstu og søguligu nevndina í nýggja felagnum „Oljutingið“ á Hotel Hafnia. Vm Alex Buvik frá Oljufyrisitingini og Geir Atle Rishovd frá Saga Petroleum Føroyar. Mynd Jan Müller*

